

# Vilja sleppa undan fólkaatkvøðu

Politisk og fíggjarlig kreppa rakar aftur Ísland eftir at landsins forsti, Ólafur Ragnar Grimsson hevur avvíst at skriva undir eina lóg um afturgjald av skuld landsins til bretskar og hollendskar bankakundar. Væntað verður nú, at hart kroysta tjóðin nú noyðist út í eina fólkaatkvøðu um lógina, samstundis sum Ísland er í vanda fyri at verða sett á svartalista á altjóða fíggjarmarknaðinum. Avgerðin hjá íslendska forsetanum kan eisini fáa avleiðingar fyri møguleikan hjá Íslandi at sleppa upp í ES, og forsætismálaráðharrin, Jóhanna Sigurðardóttir, dylur heldur ikki fyri sínai ónøgd við forsetan. – Avgerð forsetans skapar iva um endurreisnina av íslendska búskapinum. Men vit ætla fult og heilt at halda allar okkara skyldur mótvegis øðrum londum, sigur Jóhanna Sigurðsdóttir sambært danska blaðnum Børsen.



# Ja,

Nú hálka hevur verið í fleiri vikur er um at skøða seg sum best, tá farið verður út til gongu. Mong eru tey, sum longu nú eru ballað inn í gips og skinnarar, og fleiri noyðast eisini at stelta fram á høkjum í kavanum. Vit hava kannað útboðið av skølingum, bæði handils- og heimagjørdum.

Fleiri av handlunum boða frá, at teir eru um at vera í uppisetri av skølingum, og bæði hjá Andreasi í Vágsbotni og á Tjaldurs Apoteki er longu útselt. Tó eru fleiri á veg, verður sagt.

Sambært Alex Rasmussen, veðurfrøðingi á DMI, verður nógv frost komandi dagarnar. Síðani verður tátt um vikuskiftið, og seinni verður aftur nógv kaldari. So tað eru ongi útlit fyri, at ísurin, sum er harðfreystur í løtuni, nær at bráðna í bræði.

Arbeiðsformaðurin í Tórshavnar Kommunu sigur við Sosialin, at tey royna at salta um allan býin – serliga har Bussleiðin koyrir. Men tey røkka tó ikki út í smáu býlingarnar, har gongubreytirnar nú eru vorðnar rættiliga glerstoyttar. Eisini sigur hann, at saltið býtur ikki á, tá harðfryst er, so nú er nyttuleyst at salta. Tá er kanska frægari at stroya sand á.